VI‹MERKINGAR

Gó›i Páll

Leivur Hansen,
borgarstjóri

Tak tú tær bara endiliga hei›urin av skúlagøtuni í Kaldbak, sjálvt um tú lítlan og ongan lut eigur í, at máli› nú er loyst til gle›i fyri øll.

Men tú manst ivaleyst hava meira brúk fyri tí enn eg, so Páll Petersen — vælgagnist og gott val!

Handlar ì Havn

Johan Mortensen
Valevni fyri
Tjó›veldisflokkin

Vit hava heilt fitt av handlum í Havn. Er tali› og útboo›i› av handlum nøktandi vil tann nátúrliga kappingin millum hesar tryggja borgarunum vørur til kappingarførar prísar.

Men handilslívi› skal hava gó›ar umstø›ur at virka undir.

Eg skilji at ta› ofta er rættuliga stór misnøgd millum handlar í Havn vi› hvussu fer›sla, parkering, upplatingartí›ir og onnur vi›urskifti ver›a umsitin av B‡rá›num.

Um handilslívi› heldur at naka› er at finnast at hvussu B‡rá›i› umsitur teirra áhugamál so er naka› gali› og eigur slíkt at at ver›a kanna› og broytt beinanvegin.

Bureaukrati og illvilji skal ikki for›a handilslívinum í at virka til fulnar.

Tjó›veldisflokkurin vil taka sær av áhugamálum teirra handlandi.

Marita Petersen 60 ár

21.10.00

Merkiskvinna seksti ár
klótur snara – tí›in gár
barnatí› í Vági rann
fjør›ur aldi mangan mann
lívgandi for fólk og vinnu
– rann her rót hjá merkiskvinnu
tí›in mundi fornar si›ir br‡na
vunnu kvinnur rættin fram á pall at trína
stolt á landsins hægstu rók
fyrsta kvinnan lei›slu tók
har›ir mundu stormar landi› herja
– kravdist bjarging, haldgó› verja
mundi frúgvin Marita um hallir fara
– fremst í mann- og kvinnuskara
droyrreytt litar benjardøgg
tráddan vøll, har djúpt fall høgg
dimmi› lættiví›vølli frá
stinn hon mundi standa tá
havi› stóra vísti tenn
skútan stolta siglir enn
merkiskvinnan Marita
mundi sterk um pallin fara
– hitna›u hjørtu í kvinnuskara
vit geva ljó› á stóra degi
– tøkk fyri treysti, mátt og megi
ljó›a skulu ynski vár
til lukku Marita – seksti ár

Tórger›, Elin & Jonhild

Bústa›ur - ymiskar loysnir til ymisk fólk

Rigmor Dam
valevni til
b‡rá›svali› í Havn

Ein fleksibul bústa›armarkna›ur er eitt krav í framkomna samfelagnum, har mobilitetur, bæ›i á arbei›s- og bústa›armarkna›inum, er ey›kenni›.

Tórshavnar Kommuna eigur at bjó›a leiguíbú›ir ella lutaíbú›ir til fólk, sum av ymiskum orsøkum ikki hóska inn í vanliga bústa›armynstri› og húsamarkna›in. Ta› veri› seg pensionistar, einsamallir uppihaldarir, lesandi, breka›i, menningartarna›i, misn‡tarar, heimleys og sálarliga sjúk, ella bara fólk sum ikki ynskja at keypa hús, og harvi› binda seg í ein mansaldur ella longur.

Ásannast má tó, at allir hesir bólkar krevja ymiskar loysnir og eigur tí ein mi›vísur bústa›arpolitikkur, í summum førum í samstarvi vi› landsmyndugleikarnar, at ver›a førdur. Onkur hava tørv á samb‡li, onnur á íbú› vi› serligum atgongumøgulikum hjá rørslutarna›um og uppaftur onnur bara einum kamari. Sum er, eru tey flestu latin upp í hendurnar á privata íbú›armarkna›inum, har vantandi tryggleiki, høgir prísir og tilvildarlig gó›ska rá›a.

Tí eigur Tórshavnar B‡rá› at bera so í bandi, at leiguíbú›ir ver›a tøkar, og sostatt geva fólki valmøguleikan millum traditionella bústa›armarkna›in og onnur, kanska meira sosial, alternativ. Harumframt kunnu slíkar loysnir for›a einum parti av spekulatiónini á húsamarkna›inum, av tí at vinnulív og privatfólk fáa eitt alternativ, til syndarligt høgu leiguprísirnir, sum nú valda á pørtum av leigimarkna›inum. Í løtuni er hetta útleigaranna skomm, men kan lættliga eisini blíva b‡rá›sins, um ikki tiltøk ver›a sett í verk at for›a ø›rskapinum og stig tikin at broyta bústa›armynstri›.

Tíbetur eru vit ymisk og hava tí eisini ymiskan tørv.

B‡urin og bygdirnar

Jógvan Arge
valevni tjó›veldisfloksins
til b‡rá›svali›

Su›urstreymoyingar og kollfir›ingar hava skriva› eina t‡dningarmikla søgu hesi seinastu árini. Teir hava broti› ni›ur gar›ar og mørk, so alt øki›, sum høvu›ssta›urin nú fevnir um, kann mennast undir einum.

Samanleggingin av fleiri smærri kommunum vi› ta stóru kommununa í landsins mi›depli tryggjar sera gó›ar møguleikar fyri eini skipa›ari og skilagó›ari menning av landsins mi›stø›, og veitir fólkinum á hesum lei›um betri livi- og virkismøguleikar.

Me›an fólk a›rasta›ni í landinum tykjast trek at ganga saman í størri eindir at loysa átro›kandi samfelagsspurningar, hevur ein jøvn gongd fram móti størri kommunueind veri› í sy›ra parti av Streymoynni tann seinasta aldarfjór›ingin.

Tórshavnar Kommuna skor›a›i einamest á, at fáa Hoyvík, Hvítanes, Kaldbak, Argir, Sy›radal og Nor›adal uppí. Hetta sama hevur eisini sta›i› grannunum nor›anfyri Hórisgøtu í bo›i, og nú samgongurnar blivu so gó›ar, tóku kollfir›ingar av á fólkaatkvø›u.

Hugsa vit bara hendan sama aldarfjór›ingin aftur í tí›ina, so vóru møguleikarnir at menna Su›urstreym ikki nóg gó›ir, tí smáar, partvís ósamanhangandi, kommunalar eindir gyrdu Havnina inni.

Hesum eru vit tíbetur komin burturúr, og avbjó›ingin í dag er at taka vi› teimum møguleikum, sum samanleggingarnar hava vi› sær, og leggja doyin á at menna alla kommununa sambært teimum møguleikum, sum eru á teimum ymsu stø›unum.

Tí var ta› nattúrligt á rá›húsinum í Havn at vísa felagnum vi› frystihotellinum á at byggja á keiøkinum í Kollafir›i, og tí er ta› eisini sjálvsagt, at eitt nú ringvegager›in í Marknagili heldur fram út á Argir.

Ta› er ein sjálvfylgja, at allir borgarar í hesi samanløgdu kommunu hava somu rættindi og somu møguleikar eins og teir hava somu skyldur í felagsskapinum.

Ta› kann tykjast langt av Kjalnesi su›ur á Argir, men hetta er ikki naka› heilt ónátúrligt samband. Fara vit eitt sindur aftur í tí›ina, kann sta›festast, at fólkini, sum bygdu Argir í árinum 1829, komu beint av Kjalnesi.

Har hev›i í nøkur ár búgvalbingurin Andrass Mortansson av Hólarlagi, sum var giftur vi› Elspu Dánjalsdóttir av Kjalnesi. Hon var dóttur ein toftamann, sum var uppsitari á ná›insgar›inum hjá presti, og mamma hennara var úr Uppistovu á Mi›ger›i.

Kennskapur og ættarbond gjørdu, at gott samband var millum kollfir›ingar og teir fyrstu argjamenninar. Nú hava argjamenn og kollfir›ingar so tiki› saman aftur vi› allari Havnini ímillum sín. Ta› skuldi bo›a› frá gó›um.

Áheitan á Føroya Tele!

Atli S. Justinuseen
Árnafjør›ur

Eg vil vi› hesum reglum inniliga heita á Føroya Tele um at skipa solei›is fyri, at vit íbúgvar í Árnafir›i eisini kunnu n‡ta okkara GSM fartelefon óavmarka›.

Í løtuni kunnu vit ikki n‡ta GSM fartelefonina í okkara heimbygd, samstundis sum vit gjalda fastgjald fyri hesa tænastu, sum vit ikki kunnu brúka meir enn 70-80%. Eitt er tó vælskiljandi at ikki ber so væl til at røkka øllum kundunum í landinum samstundis, men vinarliga havi okkum í huga, tá tit gera næsta stig, tí sum stø›an er í løtuni, so er hetta ógvuliga ótolandi, at man ikki kann n‡ta hesa telefon, haraftrat kann vi›merkjast at her er stórur aktivitetur innan fyri vinnulívi›.

Fær borgarin nokk fyri skattapeningin?

Daisy Sloan,
valevni hjá Fólkaflokkinum

Hetta er trupult at siga, eg kenni ikki svari›, men øll hava síni serligu ynski í mun til sín persónliga tørv. Og í eini stø›u, har politikarar skulu b‡ta eina »skattakøku« solei›is, at allir bólkar í kommununi fáa sín rímiliga part, ver›ur úrslitey ynskt ein minni og/ella ód‡rari bústa›

– ta› eru nógv børn, sum onki ansingarpláss hava í dagrøkt ella dagstovni

– øll børn eiga, men hava ikki sama rætt til forskúla og frítí›arskúla

– skúlarnir eru ov smáir

– ongin skúlalækni er í Tórshavnar kommunu

– ikki allir n‡fø›ingar í kommununi fáa vitjan av heilsusystir

– bí›ilistin í Tórshavnar Musikkskúla er langur

– vegirnir treingja nógva sta›ni til ábøtur

– ta› treingir til at frí›kast um nógva sta›ni í b‡num og eg kundi hildi› fram.

Fólkaflokkurin ætlar at gera naka› vi› hetta, og vi› atliti til, at skattatr‡sti› ikki økist.

gult cyan magenta svart

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 27. oktober til hósdagin 2. november



Ingálvur fær mentanarvir›isløna

Útvarpi› ver›ur vi›, tá okkara fremsti listarma›ur, Ingálvur av Reyni, mánakvøldi› fær handa›a Mentanarvir›isløn Landsins.

Hetta er størsti hei›ur, listarmenn í Føroyum kunnu fáa, og Ingálvur av Reyni kemur Regini Dahl og Jens Paula Heinesen á baki.

Ingálvur av Reyni hevur tekna› og mála› alt sítt lív, og hann er framvegis virkin, nú hann er á 80. ári.

Sendingin mánakvøldi› kl 20 ver›ur seind beinlei›is úr Nor›urlandahúsinum.

Strálan á skíggjanum

Árant J. Hansen ummælir útvarp og sjónvarp seinastu vikuna:

Árant J. Hansen, lærari í Fuglafir›i, Nor›agøta

Føroysku sendingarnar í sjónvarpinum sí›stu vikuna hava ikki veri› tær sendingarnar ein hevur gingi› og hugsa› um dagin eftir. Og tó. Ein glotti er. Durita Holm og skip hennara Salka Valka. Ja, eg vil fara so langt sum at kalla hesa sendirø› eina sólstrálu. Eitt frískt lot uttan av havi.Teir fyrstu partarnir bo›a í øllum førum frá, at vit hava naka› gott í væntu. Myndagó›skan er framúr gó›, frásøguhátturin er lættur vi› ikki sørt av speisemi og dvølt ver›ur ikki ov leingi í sama sta›i. Sendingin er upplŠsandi og hugnalig. Eg ivist ikki í, at henda sending far fleiri at brellast eftir at royna ta› sama. Rø›in er eisini stak væl egna› til undirvísing. Snøkt sagt, ein sending fyri øll. Sjálvur havi eg altí› havt tokka til bøkurnar hjá Troels Kløvedal, Erik Vedersø og ø›rum, i› hava siglt runt knøttin vi› seglum. Eg havi ikki lisi› bókina hjá Duritu enn, men kanska er ta› gott at hava hana til gó›ar.

Ta› er seinnu árini vor›i› ein setningur heldur enn ein dreymur hjá mongum ungum í Føroyum at fara út í heim at síggja seg um. Ymsasta›ni uttan úr heimi lata ung fólk frætta frá sær, og siga frá teirra upplivingum í fjarskotnum londum. Hetta er gle›iligt, tí hetta er vi› til at byggja br‡r og harvi› tolsemi millum okkum og onnur fólkasløg. Eitt tolsemi, i› okkara eftirkomarar møguliga koma at arva beinlei›is frá foreldrunum. SvF og hinir fjølmi›larnir skulu hava rós fyri at taka hesi ungfólk í álvara.

Ein onnur sending, i› veruliga hevur fest seg í sinni›, er sendingin "Ein drápsma›ur kemur heim".

Ikki havi eg sæ› slíkan psykopat sí›ani Hannibal (the Cannibal) Lecter var á skíggjanum seinast. Ta›, sum eg hefti meg mest vi›, er, hvussu slík menniskju ver›a skapt. Hvat elur slíkan óndskap?

Hetta fingu vit nakrar t‡iligar ábendingar um í sendingini. Vantandi kærleiki og umsorgan í barnaárunum. Her hava øll foreldur naka› at hugsa um.

Uttan at mála fanan uppá veggin: Barnavernd›irnar kring landi› hava ongantí› havt so nógv og trupul mál sum nú.

Sjómanssendingin Vitin

Tveir fyrrverandi sjógarpar hava vitja› útvarpsstovuna í Lindini. Ta› eru Jóannes Jacobsen úr Hvalvík og Øssur Berghamar úr Havn, sum fara at siga eitt sindur frá teirra upplivingum á sjónum.

Jóannes fer at siga frá eini dramatiskari hending umbor› á fyrsta Bliki, sum Skipafelagi› átti. Øssur fer at hugglei›a um ein túr til skips, har mammubeiggin, Just í Túni, var skipari.

Mi›skei›is í sendingini tekur Øssur ræ›i› á mikrofonini og fremur mikrofonkvett. Hann roynir seg eina løtu sum útvarpsvert. M.C. Restorff endar nú sum gestur í síni egnu sending. Ta›, sum hann sigur frá, er ikki vanliga at hoyra í sjómanssendingini Vitanum.

M.C. Restorff er hesafer› vertur í sjómanssendingini Vitanum.

Spurningarkappingin aftur á skránni

Útvarp Føroya hevur í fleiri ár sent spurnarkappingar. Hesar hava veri› fyri bæ›i skúlanæmingar og meira tilkomnar luttakarar, men tey hava tó ikki kappast móti hvørjum ø›rum.

Hesar spurnarkappingarnar hava nú fleiri ár á baki. Tær fyrstu vóru í sekstiárunum, og hava tær veri› fastur gestur á vetrarskránni hjá útvarpinum vi› jøvnum millumbilum, tó er okkurt ári› dotti› burturmillum.

Hesi seinastu árini hevur Suni Merkistein sta›i› fyri kappingunum, og hann hevur havt ein dómara afturat sær fyri at halda skil á stigunum.

Tey fyrstu árini Suni hev›i sendingina um hendi vóru kappingarnar mest fyri vaksin, og spurningarnir vór›u eisini laga›ir til vaksin.

Í fjor var› so fari› undir spurnarkapping millum framhaldsdeildirnar í Føroyum. Allir skúlarnir í Føroyum, sum hava framhaldsdeild, sendu tríggjar gløggar næmingar til kappingina. Endin var at Vágs skúli vann á einum av Klaksvíks skúlunum. Fleiri vóru tikin á bóli, hvussu væl tey ungu vistu, og kappingin var væleydna›. Kappingin var› solei›is skipa›, at luttakararnir fingu sama spurning settan og skuldu sí›ani svara.

Nú herjar Suni Merkistein so á aftur vi› einum n‡ggjum umfari av spurnarkappingum fyri framhaldsdeildirnar. Sendingarnar ver›a á skránni hvørt leygarkvøld kl. 19.05. Fyrsta kappingin ver›ur millum grannarnar úr Fuglafjar›ar skúla og Stranda skúla. Eins og í fjør ver›ur Ove Olsen dómari í kappingini. Anna›hvørt leygarkvøld ver›ur sendingin á skránni.